


# Atlantic Petroleum: Væleydnaðar gassroyndir

Deil:

**Jan Müller**

13.11.2014 - 13:04

Oljan.fo

Pegasus gasskeldan, sum Atlantic Petroleum er partur av í bretska partinum av Norðsjónum, er eftir øllum at døma eitt stórt gassfund, sum kann fáa stóran týdning fyri føroyska oljufelagið. Nýggja kanningar eru sera positivar og skriva bretskir miðlar, at hetta fundið kann fáa týdning fyri bretska gassmarknaðin í framtíðini. Centrica Energy, sum Atlantic Petroleum arbeiðir saman við í fleiri loyvum, brúkar orðingina um úrslitið av seinastu kanningunum “very positive results.” Nýggja gasskeldan liggur nær Cygnus

gassútbyggingina og kann tí fáa stóran týdning fyri hesa útbygging eisini. Centrica er størsti gassframleiðari í Bretlandi. Colette Cohen, varaforseti hjá felagnum sigur, at Pegasus kann fáa stóran týdning fyri gassframleiðsluna í Bretlandi og verða nú gjørdar útrokningar fyri eina møguliga útbygging. Atlantic Petroleum kunnger eisini positivu úrslitini av seinastu kanningunum á Pegasus West og sigur stjórin Ben Arabo seg vera sera fegnan um úrslitið.




